## Trý er talið

Lítil ivi er um, at trý-talið í dag verður mett sum serliga heppið í EB/Streymi. Eftir at tað í fjør og fyrraárið gjørdist til silvur, varð talan í triðju royndini um gull. Gullið varð eisini fingið til høldar við triðja matchbóltinum, eftir at tað ikki varð vunnið móti NSÍ og B36. At tað so hendi í einum dysti, har toppskjúttin hjá felagnum gjørdi hattrick í 3-1 sigri gjørdi ikki lagið verri.



## Drupu mytuna

Síðani 1992 hevur Klaksvíkarkappingin markerað starskotið til nýtt kappingarár í føroyskum fótbólti. Fram til týskvøldið var tó ongan tíð hent, at vinnarin av Klaksvíkarkappingini eisini hevur vunnið FM-heitið, men heldur ikki hetta legði EB/Streymur nakað serligt í. Snøgt sagt hava teir vunnið tað, sum teir hava nortið við í ár, og hví so ikki taka Klaksvíkarkappingina við á vegnum.




*59 min: Arnbjørn hevur latið fyrstu kanónina av, og Predrag Markovic kann bara hyggja at, meðan bólturin støkkur niður innan fyri strikuna*

*Mynd: Jens Kr. Vang*




*61 min: Eitt veruligt center-forward mál. Arnbjørn hevur tveitt seg fram millum vinir og fíggindar, og so spílast meskarnir í Skála-netinum fyri aðru ferð*

*Mynd: Sofus D. Johannesen*

### Skála-EB/Streymur 1-3 (0-0)

# Triðju ferð fall bjørnin

## Hagtøl bíða

Tað er ikki altíð, at 12 ítróttasíður røkka til alt, sum røkkast skal.

Soleiðis er eisini í dagsins Sosiali, har vit hava raðfest stóra fagnaðin hjá EB/Streymi fram um hagtølini, sum kanska kunnu tykjast turrislig í mun til sjampanjusproytið á Mýruhjalla og við Margáir.

Fullfíggjaðu hagtølini fyri 26. umfarið av Formuladeildini mugu tí bíða til í morgin, og niðan fyri prenta vit tí bert yvirlit yvir úrslit og málskjúttar í gjár, eins og stigatalvan eisini sæst á síðuni.

**-mørk**

**KÍ-NSÍ 0-1 (0-1)**
0-1: sjálvmál

**B68-ÍF 0-1 (0-0)**
0-1: Andy Olsen

**Skála-EB/Streymur 1-3 (0-0)**
0-1: Arnbjørn T. Hansen
1-1: Obi
1-2: Arnbjørn T. Hansen
1-3: Arnbjørn T. Hansen

**HB-B36 3-0 (1-0)**
1-0: Andrew av Fløtum
2-0: Fróði Benjaminsen
3-0: Fróði Benjaminsen
Reytt kort: Jákup á Borg, B36

**B71-Víkingur 0-1 (0-1)**
0-1: Sam Jacobsen

*Skála*

*EB/Streymur*

**Gummibeinini vóru burtur. Hvør sum ein vístu spælararnir hjá EB/Streymi, at teir vildu vinna FM-gullið. Og so var tað sera hóskandi, at fremsti kandidaturin til heitið sum ársins spælari, smekkaði til við einum hat-trick**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tey høvdu bíðað í nakrar vikur. Ja, onkur helt í tvey ár. Í so máta var tað helst hóskandi, at tað var á sjálvum tvey ára degnum fyri mest sum ófatuliga missin móti KÍ í 2006, at EB/Streymur loksins jarðaði alt tos um gummibein.

Sum útsendi tíðindamaðurin hjá Rás2 tók til, tá hann kom ígjøgnum til 3. hálvleik, so var bara eitt slag av gummi at finna á Mýruhjalla hendan dagin. Nevnliga gull-bamsurnar hjá Haribo. Ein tvítýdd viðmerking, sum helst sipaði til bæði gummibein og stóru bamsuna, sum nú var skotin.

### Spældu fyri gullinum

Eingin ivi er um, at nógva tosið um gummibein seinastu vikurnar hevur nervað bæði spælarar og viðhaldsfólk hjá EB/Streymi seinastu vikurnar.

Men tó ikki meira enn so, at spælararnir – tá mest stóð á – prógvaðu, at teir væl og virðiliga vóru menn fyri at átaka sær uppgávuna sum FM-favorittar.

Nøkur av eyðkennunum í dystunum móti NSÍ og serstakliga B36 vóru merkt av nervum. Í verjustøðu vóru spælararnir als ikki nóg avgjørdir seinnu trý korterini móti B36, og við bóltinum tóktist spælararnir mest sum frystir, soleiðis at talan gjørdist um alibi-spæl heldur enn nakað skapandi av slagnum.

Men alt hetta var slept týskvøldið. Hóast veðurlíkindini ikki vóru av teimum bestu, so sást alt fyri eitt, at talan var um avgjørdar menn. Hóast Skála við vindinum í rygginum ofta flutti bæði bóltin og nógv fólk niðan móti brotsteiginum hjá EB/Streymi, so gjørdist talan ongan tíð av álvara um vandastøður. Ikki minst var Marni Djurhuus ein sannur brandur, sum hvørja tí einastu ferð timaði luftdystirnar somikið væl, at hann støðugt fekk beint bóltin burtur.

Og hóast mótvindin megnaði EB/Streymur eisini at spæla seg til sínar møguleikar fyri steðgin. Tann størsta átti Hans Pauli Samuelsen, sum gjørdist púra leysur eftir gjøgnumbrotsroynd frá Arnbirni Hansen, men kontrolleraði fluktarin endaði á stólparótini, áðrenn hann støkk í føvningin á liggjandi Predrag Markovic í Skála-málinum. Og eina aðru ferð rullaði bólturin mest sum undir nøsini á Arnbirni T. Hansen, tá Skálaverjan ruddaði burtur.

### Átta ótrúligir minuttir

Fótbóltur er eitt liðspæl, har allir mans so ella so eiga sín part í tí, sum hendir.

Men skal navn setast á hetjuna hjá EB/Streymi týsdagin, so er valið einfalt. Við sínum hat-trick var Arnbjørn T. Hansen maðurin, sum sparkaði gullið seinasta vegin til Margáir, og sum heild hevur Arnbjørn eisini verið ársins maður hjá EB/Streymi. Ikki minst fyrru helvt av kappingarárinum, har hann dyst eftir dyst var maðurin, sum koppaðu tøttum uppgerðum til fyrimuns til sín og EB/Streym.

Seinastu fimm dystirnar undan týsdegnum hevði áleyparin tó ikki funnið meskarnar. Og tað var ikki frítt, at áskoðararnir hugsaðu um 2006, tá hann tíðliga í seinna hálvleiki var bara nær við og næstan, tá bólturin skuldi sendast inn.

Men so var tað, at alt brádliga eksploderaði.

René Tórgarð sparkaði langt og høgt niðan á vøllin. Arnbjørn var kanska skeivu megin rangstøðumarkið, men linjuverjin helt flagginum niðri, og so var tað, at formatið varð sýnt. Rørslurnar vóru kanska gummibleytar, men sinnið var ísa-